# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*






*Í dag letur Bergur Thorsteinsson upp bilverkstaðin Piston í Hornabø*

# Nýggjur bilverkstaður í Hornabø

Í dag letur ein nýggjur bilverkstaður upp í Hornabø í Havn. Tað er Bergur Thorsteinsson, sum letur upp bilverkstaðin Piston, á horninum Frælsið / J.C. Svabosgøta, beint við Landssjúkrahúsið.

Bergur er útbúgvin bilsmiður og bjóðar seg fram til at gera smærri umvælingar og service upp á bilar sum t.d. at skifta dekk, skifta olju og perur. Bert umvælingar sum ikki taka so langa tíð.

Spurdur um hví verkstaðurin eitur Piston, sigur Bergur, at Piston merkir stempul, og harav kemur slagorðið hjá fyritøkuni "The hart of the engine". Stempl̄ið er líkasum hjartað í motorinum. Piston í Hornabø hevur telefon 250000.




*Aerodynamiski konseptbilurin Iveco Glider við m.a. Led-forlyktum*

## Iveco konseptbilur

Á bilaframsýningini IAA í Hannover herfyri var ein nýggjur sera økonomiskur Iveco EcoStralis lastbilur lanseraður. EcoStralis kemur á marknaðin seinni í ár. Á framsýningini varð eisini aerodynamiski konseptbilurin Iveco Glider sýndur fram.




*Iveco EcoStralis kemur á marknaðin seinni í ár*

BILRADIO
Aktuel biltíðindi við Maggi Gunnarsson

Hósdagin 14. oktober kl. 17.10

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 14. oktober er samrøða við Boga Rasmussen, stjóra á bilfyritøkuni BBR Service á Lambareiði, um virksemið hjá fyritøkuni við bilverkstaði og leigubilum. Nýggi Volvo S60 verður royndarkoyrdur saman við Tróndi Sigurðsson, sølumanni hjá P/F Wenzel. Eisini er samrøða við Bergur Thorsteinsson um nýggja bilverkstaðin Piston í Hornabø.

Bergur Thorsteinsson frá Piston í Hornabø


Bogi Rasmussen frá BBR Service á Lambareiði


Tróndur Sigurðsson frá P/F Wenzel


RÁS 2
...títt radio